# Læraraskúlavøllurin brúktur til off-road koyring


*Ikki síðani seinastu ólavsøkukonsert hevur vøllurin uttan fyri Føroya Læraraskúla verið so ljótur*
*Mynd: Edith Johannesen*

**Ikki síðani seinastu ólavsøkukonsert hevur vøllurin uttan fyri Føroya Læraraskúla verið so ljótur, sum hann var leygarmorgunin, tá onkur hevði spolað runt á vøllinum í einum lítlum reyðum Golf**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Leygarkvøldið hevði onkur fingið tað sjáldsama hugskot, at taka ein bil og koyra inn á vøllin uttan fyri Føroya Læraraskúla. Eitt undarligt hugskot, men ikki nóg mikið við tí. Hesin hevði eisini spolað stóran part av vøllinum upp, soleiðis at hann í morgun var lítið vakur á at líta.

Tá vit tosaðu við skúlatænaran í morgun, stóð bilurin framvegis á vøllinum. Hann hevði júst tá tosað við løgregluna, sum hevði funnið útav, hvør átti henda góða bil, og løgreglan hevði eisini givið viðkomandi boð um, at fáa henda bilin fluttan av vøllinum, sum neyvan hevur verið so ljótur, sum síðani seinastu ólavsøkukonsert.

Skúlatænarin veit onki um, at bilar hava gjørt seg inn á vøllin á henda hátt áður, men speiskliga segði hann, at tað var nóg væl, at bilførarin hevði megnað at gjørt so nógv um seg, so bleytur og vátur vøllurin er.

– Hann kundi eins væl staðið fastur beinanvegin, heldur Jóni Johannesen, skúlatænari.

Sum skilligt er, so harmast hann um standin, vøllurin nú er í, men hann sigur, at hóast sporini eru djúp nakrastaðni, so fer tað helst at laga seg sjálvt við vøllinum.


*Tað var ein reyður Golf, sum var brúktur sum plógv á vøllinum uttanfyri Føroya Læraraskúla*
*Mynd: Edith Johannesen*

# Forbankað keðiligt

**Tað heldur Johan í Kollafirði, ið eigur bilin, sum varð brúktur til plógv á Læraraskúlavøllinum leygarkvøldið. Bilurin hevði júst verið til sín, og eisini hevði Johan orðnað eina sprekku á rútinum, men nú eru allir rútarnir brotnir og bilurin við oyðilagdur**



LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað var keðiligt at vakna sunnumorgunin hjá Johan í Kollafirði.

– Sunnumorgun havi eg líka ringt við at vakna sum øll onnur. Tá eg so komi upp og síggi, at bilur mín er burtur og seinni fái at vita hvar hann er, so oyðilegðist dagurin fullkomiliga, sigur Johan í Kollafirði, hvørs bilur varð stolin leygarkvøldið, og síðani brúktur til off-road koyring á vøllinum uttan fyri Føroya Læraraskúla.

Bilurin stóð uttanfyri hjá Johan. Hann hevði ongar plátur, var í ringum standi og lykilin lá í handskarúminum. Sunnumorgunin stóð bilur á Læraraskúlavøllinum, í sera ringum standi og við lyklinum í.

– Tað undrar meg faktiskt, at tey yvirhøvur hava fingið bilin at starta, sigur Johan í Kollafirði.

### Eydnubilurin

Hesin fitti reyði Golf var Johan í Kollafirði sera gleður fyri.

– Hetta var mín eydnubilur. Vit kallaðu hann jólagávan, tí eg hevði ætlað at málað eina gula strípu allan vegin aftur eftir bilinum, eina gula strípu tvørtur um og síðani seta eina sloyfu á takið. Men so skuldi ikki vera, ásannar Johan í Kollafirði harmur.

Ikki minni harmiligt er, at bilurin júst hevði verið til sín, og eisini orðna fleiri ting fyri at blíva koyriklárur.

– Ein rútur hevði eina sprekku á, so tann rútin hevði eg júst skift út. Men nú eru allir rútarnir knústir, og tað er forbankað keðiligt.

– Nú er bilurin ongin jólagáva longur, heldur en hann tað beint øvugta, sigur hann.

### Skilir skálkarnar

Í morgun hevur Johan fingið boð frá løgregluni um, at bilurin skal flytast. Og sjálvandi skal hann tað, heldur Johan eisini, men vísir á, at tað ikki verður nøkur løtt uppgáva hjá honum.

Johan í Kollafirði sigur, at hann gleðir seg at finna skálkarnar, sum hava tikið bilin hjá honum og oyðilagt hann, tí so kann hann fáa endurgjald fyri bilin. Men samstundis sum Johan í Kollafirði sigur hetta, so sigur hann seg eisini skilja skálkarnar.

– Um eg eisini skuldi stolið ein bil, so hevði eg nokk gjørt sum teir. Fari og tikið ein gamlan bil og oyðilagt okkurt á skúlanum, sum eg sjálvur hevði gingið á.

### Billeysur á jólum

Nú bilurin stendur oyðilagdur uttan fyri Læraraskúlan og Johan í Kollafirði er billeysur á jólum. Tað er ein serstakliga keðilig støða at vera komin í.

– Eg standi púrasta á berum her. Eg veit onki, um hvør kann hava gjørt hetta, sigur Johan í Kollafirði og harmast. Tó er tað hjá honum ein uggi, at uppkláringararbeiði er farið í gongd.


*Løgreglan veit hvør eigur bilin, og viðkomandi hevur eisini fingið boð um at flyta hann, og tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki, tí í morgun startaði bilurin uttan nakað, hóast ringa standin*
*Mynd: Edith Johannesen*

# Veðrið er besti politisturin

**Vikuskiftið hevur verið friðarligt. Ein bardagi, okkurt ferðsluóhapp og nakrir brotnir rútar, er tað løgreglan hevur tykist við. Av løgreglustøðini siga tey, at ringa veðrið um vikuskiftið er orsøkin til, at so lítið er hent**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Eftir nøkur buldraslig og ógvuslig vikuskiftið, var endiliga eitt friðarligt í høvuðsstaðnum. Ikki so at skilja, at løgreglan hevur kett seg, men í mun til undanfarin vikuskifti, var lítið at gera.

### Veðurskaðar

Onkrir smáskaðar á hús vóru kring landið. Serliga sunnumorgunin gjørdi nógvur vindur um seg, og í Hvalba høvdu tveir kjallarar fingið nakað av skaða orsaka av regninum, sum hevur verið.

Somuleiðis var tað í Hvalba, at ein hvirla tók tveir lítlar parkeraðar bussar, og gjørdi stóran skaða á teir.

### Brotnir rútar

Av øðrum skaðum løgreglan hevur fingið fráboðan um, kunnu nevnast nakrir brotnir rútar í høvuðsstaðnum. Leygarnáttina hevði onkur hugnað sær við at bróta fýra rútar á Læraraskúlanum. Og somuleiðis hevði onkur stytt sær stundir í Magnus Heinasonargøtu, við at bróta tríggjar rútar á einum húsum.

### Rúsdrekkakoyring og ferðsluóhapp

Eisini var tað leygarnáttina, at løgreglan tók ein fyri rúsdrekkakoyring. Viðkomandi varð tikin við oman á støðina, har ein blóðroynd varð tikin.

Løgreglan skrivaði eisini frágreiðing í samband við eitt annað ferðslumál í býnum leygarnáttina. Hetta var um 4-tíðina við Landavegin, har tveir bilar vóru rendir saman. Bilarnir báðir fóru rættiliga illa, men fólkini í bilunum sluppu øll snikkaleys – uttan ein, sum varð fluttur á sjúkrahúsið til nærri kanningar.

Samanumtikið var farna vikuskiftið lutfalsliga friðarligt. Hetta eisini hóast jólafrokostarnir nú eru í hæddini. Á løgreglustøðini fegnast tey um, at so er, men samstundis ásanna tey, at ringa veðrið hevur spælt sín leiklut.

– Veðrið er okkara besti politistur, flennir vakthavandi á løgreglustøðini í morgun og sipar til, at tá tíma fólk ikki at ganga og vála í býnum, men heldur skunda sær heim, og tí er ikki so nógv rok í býnum eitt illveðurskvøld, sum tá veðrið er gott.